# RØRSMIÐUR, RØR- OG BLIKKSMIÐUR, FÍNSTÁLSMIÐUR OG SVEISARI

## Leiðbeining um førleikameting

Útgávudagur 25. september 2025

YRKIS depilin

Undirvísingarstýrið

# Innihald

1. Hvat er førleikameting? .......... 3
2.Samskipan av førleikametingini .......... 3
3. Hvat er endamálið við førleikametingini? .......... 4
4. Hvussu verður førleikametingin fyriskipað? .......... 4
6. Hvussu verður sjálv førleikametingin framd? .......... 5
7. Hvør kann verða førleikamettur til hesar útbúgvingarnar? .......... 6
8. Hvussu verða áður vunnir førleikar mettir og viðurkendir? .......... 6
9. Samanumtøka og niðurstøða frá førleikametingini .......... 7
10. Hvussu verður førleikametingin endaliga staðfest? .......... 7

| | |
|---|---|
| Dagfest | 12.05.2025 |
| Ábyrgd | Yrkisdepilin |
| Útgáva | 1./25.09.2025 |

# Leiðbeining um førleikameting til rørsmið, rør-blikksmið, fínstálsmið og sveisara

## 1. Hvat er førleikameting?

Hvat er førleikameting av áður vunnum førleikum?

1. Ein tilgongd (prosess), har læringsúrtøkan (áður vunnir førleikar) hjá tí einstaka verður skrásett, samanborin við og hildin upp ímóti førleikakrøvunum í ávísari útbúgving.
2. Ein eftirmeting av skjalprógvaðum førleikum, sum eisini kunnu verða stuðlaðir av øðrum sløgum av prógvum ella útsøgnum, so sum skrivligum avrikum, frágreiðingum, viðmælum, myndum, tekningum, samrøðum, viðkomandi uppgávum o.s.fr.
3. Ein samsøða millum førleikametaran og tann førleikametta um áður vunnar førleikar hjá tí einstaka, ið kunnu vera av týdningi fyri úrslitið av førleikametingini.
4. Tað er sera umráðandi, at førleikametingin tekur atlit til heildina av førleikum, bæði formligum førleikum, óformligum og ikki-formligum førleikum. Óformligir førleikar eru teir førleikar, sum ein persónur vinnur sær uttan fyri útbúgvingarskipanina, so sum arbeiðsroyndir av alskyns slag, felagsarbeiði, frítíðarvirksemi, arbeiði heima við hús o.s.fr. Ikki-formligir førleikar eru teir førleikar, sum t.d. stava frá skeiðsvirksemi og venjingum, sum verða fyriskipað uttan um útbúgvingarskipanina, og sum kunnu enda við prógvi ella luttøkuváttan.
5. Viðurkenning av førleikum fær alsamt størri týdning fyri lond, vinnur, einstaklingar og virkir. Tí er umráðandi, at førleikametingin er gjøgnumskygd, fyri at tryggja dygdina og virðið í niðurstøðuni, ið verður orðað eftir at førleikametingin er gjørd. At førleikametingin er gjøgnumskygd merkir, at øll tilgongdin í førleikametingini verður skjalfest, serliga við tí fyri eyga, at ein møgulig kæra um niðurstøðu kann verða sett fram.

## 2.Samskipan av førleikametingini

Hvørjir stovnar/persónar standa fyri og gera førleikametingina, ið hevur til endamáls at avdúka viðkomandi førleikar og royndir innan yrkið:

- Samskiparin og vegleiðarin, ið samskipa førleikametingina (Undirvísingarstýrið).
- Ein faklærari innan yrkið, sum Undirvísingarstýrið hevur útnevnt eftir avtalu við skúlan, ið bjóðar útbúgvingina, t.e. Glasir og TSK.
- Tveir faklærdir innan útbúgvingina, sum Yrkisnevndin hevur útnevnt, og sum umboða arbeiðsgevaran og fakfelagið.

## 3. Hvat er endamálið við førleikametingini?

Endamálið við førleikametingini er at staðfesta, hvørjar førleikar tann førleikametti kann fáa góðskrivaðar, í sambandi við at hann ynskir at útbúgva seg til til eina av hesum útbúgvingunum.

Førleikametingin skal avdúka førleikar, ið tann førleikametti hevur, sum eru viðkomandi fyri útbúgvingina, og sum t.d. kunnu vera við til at geva umsøkjaranum niðurskurð í lærutíðini ella váttan frá skúlanum, at viðkomandi lýkur førleikakrøvini í tí partinum av útbúgvingini, sum liggur á skúlanum. Endamálið við førleikametingini er at geva persónum við drúgvum royndum í yrkinum og viðkomandi ástøðiligum førleikum stytting í útbúgvingini til útbúgvingina, tey ynskja at nema sær.

## 4. Hvussu verður førleikametingin fyriskipað?

Førleikameting er ein skipað tilgongd, ið fevnir um fyrireiking, førleikameting og viðurkenning av førleikum, umframt niðurstøðu frá førleikameting.

- Fyrireikingin fevnir um samskipan, vegleiðing og innsavnan/skráseting av førleikum.
- Førleikameting og viðurkenning av førleikum verður gjørd við støði í samrøðu, sjálvsmetingarlista, skjalamappu, prógvum, váttanum, uppgávuloysnum o.tíl. Tríggir metarar standa fyri hesum; ein faklærari frá viðkomandi skúla, sum er útbúgvin í yrkinum og tveir serkønir í yrkinum, umboðandi arbeiðsgevara og fakfelag, sum eru góðkendir av Yrkisnevndini at skoða og at meta um sveinaroyndir.
- Niðurstøðan verður orðað í mun til, hvussu umsøkjarin lýkur førleikakrøvini í útbúgvingini. Faklærari og førleikametarar hava ábyrgdina av, hvussu niðurstøðan verður orðað, og teir vátta niðurstøðuna við síni undirskrift. Niðurstøðan er eitt løgfrøðiligt skjal.

## 5. Hvussu verður førleikametingin fyrireikað?

Tá skúlin, Yrkisdepilin ella Undirvísingarstýrið fær eina umsókn um førleikameting, verður ein samskipari settur at fyrireika tilgongdina. Samskiparin skal hava kunnleika til og arbeiða við førleikameting.
Samskiparin tekur støðu til, um umsøkjarin uppfyllir treytirnar fyri at verða førleikamettur. Síðan verður avgerð tikin um, hvør skúli eigur at vera við í víðari tilgongdini og heitt verður á skúlan um at útnevna faklærara til uppgávuna.
Samskiparin heitir á Yrkisdepilin um at fáa førleikametarar valdar at standa fyri førleikametingini.
Samskiparin skal vegleiða umsøkjaran í øllum liðum í tilgongdini og stuðlar umsøkjaranum at savna inn allar viðkomandi upplýsingar um førleikar og royndir hjá umsøkjaranum, sum førleikametingin skal byggja á. Samskiparin fyrireikar síðan tilfarið til førleikametararnar at taka støðu til.
Umráðandi er at fáa savnað so nógvar og viðkomandi upplýsingar sum gjørligt. Ymiskir hættir eru at skjalfesta førleikar og royndir, eitt nú við at skráseta upplýsingar í eina førleikamappu, við at brúka ein sjálvsmetingarlista, ið er gjørdur til endamálið, við prógvum, váttanum, ummælum, myndum, tekningum, umframt við verkligum uppgávum, sum faklærari og førleikametararnir meta, at umsøkjarin skal loysa, fyri soleiðis at fáa eitt betri grundarlag at byggja metingina á.

# 6. Hvussu verður sjálv førleikametingin framd?

Í umsóknini um førleikameting hevur umsøkjarin upplýst, hvørja av útbúgvingunum hann ynskir at verða førleikamettur upp ímóti. Tilgongdin við førleikametingini skal avdúka, hvørjum fakligum stigi umsøkjarin er á, tá kemur til:

- kravdu skúlagongdina til útbúgvingina
- verkligu lærumálini, so sum ásett í kunngerðini fyri útbúgvingina og námsskipanini

Grundarlagið undir metingunum hjá faklærara og førleikametarum er regluverkið, sum útbúgvingin er fevnd av.
Talan er um hesar lógir og kunngerðir, tá talan er um útbúgvingina til rørsmið, rør- og blikksmið, fínstálsmið og sveisara:

- Lóg um yrkisútbúgvingar: Lógasavn Løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 136 frá 8. desember 2023
- Kunngerð um felagsreglur í yrkisnámi Lógasavn Kunngerð nr. 83 frá 4. juni 2013 um felagsreglur í yrkisnámi, sum seinast broytt við kunngerð nr. 121 frá 19. juli 2019
- Útbúgvingarkunngerð um útbúgvingar innan maskin og framleiðslu Lógasavn - Kunngerð nr. 131 frá 19. september 2022 um útbúgvingar innan maskin og framleiðslu
- Námsskipanir fyri útbúgvingarnar https://www.yrkisdepilin.fo/Files/Files/Namsskipan/N%C3%A1msskipan%20fyri%20maskinsmi%C3%B0.pdf
- Lóg um førleikameting (logir.fo) Løgtingslóg nr. 67 frá 15. mai 2014 um førleikameting, sum broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 10. mai 2017
- Kunngerð um førleikameting (logir.fo)

Tá faklærari og førleikametararnir hava fingið savnaða tilfarið um tann, ið skal vera førleikamettur, ráðleggja teir sínámillum og saman við samskiparanum, hvussu sjálv metingin fer fram, umframt hvar og nær hon fer fram.

Út frá tilfarinum verður støða tikin til, hvørt umsøkjarin skal koma til eina samrøðu við faklærara og førleikametarar, soleiðis at faklærari og førleikametarar kunnu staðfesta, at upplýsingarnar, sum tann førleikametti hevur upplýst, eru veruligar og rættar. Eru ivamál, verður tann førleikametti biðin um at svara spurningum frá faklærara og førleikametarum, ella verður biðin um at loysa ávísar viðkomandi uppgávur, sum skulu geva eina greiðari ábending um førleikarnar hjá viðkomandi innan yrkið, sum umsóknin rættar seg ímóti.

Umsøkjarin skal loysa eina verkliga uppgávu, sum endar við einari roynd. Skúlin leggur uppgávuna til rættis og skipar fyri royndini. Førleikametarar ella skoðanarmeistarar fylgja við fyrireikingini til royndina og meta

um endaliga úrslitið. Síðan verður endaliga metingin gjørd.

Málið við førleikametingini er at finna fram til fakliga støðið hjá umsøkjaranum og út frá tí gera eitt tilmæli um, hvat umsøkjarin møguliga skal hava afturat av skúlagongd og verkligari læru, áðrenn hann ella hon kann fara undir at fyrireika seg til og fara upp til sveinaroynd.

Teir førleikar, sum faklærarin metir, at umsøkjaranum vantar, til tess at lúka førleikamálini til skúlaskeiðini, avgera, hvørji skúlaskeið umsøkjari fær góðskrivað og hvørji hann skal taka.

Førleikametararnir meta um, hvørjar førleikar umsøkjarin hevur til tess at uppfylla verkligu lærumálini í útbúgvingini, sum eru ásett í útbúgvingarkunngerðini. Meta førleikametararnir, at umsøkjaranum vantar ávísar førleikar, verður lærutíðin longd út frá einari meting av, hvussu leingi umsøkjarin skal vera í læru til tess at hava rokkið kravdu førleikamálunum í útbúgvingarkunngerðini, áðrenn hann kann fara upp til sveinaroynd og fáa sveinabræv.

Tey, sum søkja um førleikameting, skulu sum minsta krav, aftaná at tey eru førleikamett, taka fjórða skúlaskeið (10 vikur) í útbúgvingini og sveinaroyndina á 5 vikur, um framt at tey skulu gera lærusáttmála við góðkent lærupláss um at koma í læru í minst 15 vikur, áðrenn tey kunnu fáa sveinabræv.

Ynskir umsøkjarin at fáa sveinabræv antin sum rørmiður, rør- og blikksmiður, fínstálsmiður ella sveisari, má hann gera lærusáttmála við góðkent lærupláss, áðrenn hann sleppur víðari í útbúgvingini.

# 7. Hvør kann verða førleikamettur til hesar útbúgvingarnar?

Tann, ið verður førleikamettur upp ímóti einari av útbúgvingunum sum hetta skjalið fevnir um, skal vera í minsta lagi 30 ára gamal og hava í minsta lagi 5 ára viðkomandi starvsroyndir í yrkinum. At hava viðkomandi starvsroyndir merkir, at viðkomandi skal hava arbeitt fulla tíð innan hetta slag av vinnu í ? (?) av teimum seinastu ? (?) árunum.

# 8. Hvussu verða áður vunnir førleikar mettir og viðurkendir?

Áðrenn sjálv niðurstøðan verður orðað, eru allir førleikar skrásettir, vektaðir og at enda viðurkendir. Hvussu verður hetta gjørt í verki?

Í fyrstu atløgu skal niðurstøða gerast um, hvørt umsøkjarin hevur starvsligar og/ella bókligar royndir, ið hava týdning fyri útbúgvingina. Síðan skal avgerast, hvussu væl hesar royndir samsvara við førleikakrøvini, sum útbúgvingarkunngerðin ásetir.

Førleikametararnir hava ábyrgdina av niðurstøðuni og tryggja tað yrkisfakliga støðið hjá umsøkjaranum. Faklærarin ger niðurstøðu um ástøðiliga støðið hjá umsøkjaranum.

Saman finna førleikametararnir fram til, hvørjum fakligum stigi umsøkjarin er staddur á og hvat honum tørvar til tess at fáa sveinabræv í einum av yrkjunum, sum hetta skjalið fevnir um.

Umráðandi er, at lívsroyndirnar hjá umsøkjaranum verða havdar í huga, tá yrkisligu førleikarnir hjá

umsøkjaranum verða mettir og hildnir upp ímóti førleikamálum í kunngerðini og førleikakrøvum í vinnuni í dag. Tess betur hesir førleikar og lívsroyndir eru eyðmerkt og skjalfest, jú neyvari kunnu førleikarnir verða mettir og viðurkendir.

# 9. Samanumtøka og niðurstøða frá førleikametingini

Samskiparin ger dømi um, hvussu niðurstøður frá eini førleikameting kunnu verða orðaðar, umframt at hann ráðgevur og hjálpir faklærara og førleikametarum at orða endaligu niðurstøðuna.
Niðurstøðan lýsir í stuttum endamálið við útbúgvingini, sum førleikamett verður í, og tey lýstu førleikakrøvini, ið sett verða í lógum, kunngerðum, námsskipanum og námsætlanum.
Niðurstøðan lýsir í stuttum teir førleikar, sum førleikametti hevur víst, at hann ella hon hevur, tær verkligu royndirnar, umframt skúlagongd og aðrar viðkomandi útbúgvingarligar royndir.
Niðurstøðan staðfestir greitt, hvat tann førleikametti skal útvega sær afturat av verkligum royndum og skúlagongd, fyri at hann ella hon kann fáa sveinabræv innan nevndu útbúgving.
Niðurstøðan verður orðað á eitt skjal, sum er gjørt til endamálið, har tilvísing er til bæði Yrkisdepilin og til Undirvísingarstýrið. Skalið skal vísa til útbúgvingarkunngerðina, sum førleikametingin er gjørd upp ímóti.
Faklærari og førleikametarar skriva undir niðurstøðuna frá førleikametingini.

# 10. Hvussu verður førleikametingin endaliga staðfest?

Tá endaliga niðurstøðan er undirskrivað av faklærara og førleikametarum, skal hon sendast Yrkisdeplinum, sum leggur niðurstøðuna fyri Yrkisnevndina til góðkenningar. Tá niðurstøðan er endaliga góðkend, er hon eitt løggildugt skjal, ið tann førleikametti kann nýta sum grundarlag undir framhaldandi útbúgving.
Í tann mun tað ber til og er neyðugt, kann skúlin skipa fyri serliga lagaðari undirvísing ella frálæru, sum tann førleikametti skal hava. Mest vanligt er tó, at førleikametti fylgir teirri undirvísing/frálæru, sum skúlin annars bjóðar í útbúgvingini.